# Íslendingar keypa kekkiskt flogfelag

Íslendska flogfelagið Icelandair hevur nú skrivað undir sáttmála um at keypa kekkiska flogfelagið Travel Service, sum er tað størsta privata flogfelagið í Kekkia. Icelandair keypir 50 prosent av partabrøvunum nú og 30 prosent næsta ár. Travel Service fæst við leiguflogferðir millum Prag og Budapest og eigur eisini lágprísfelagið Smart Wings. Travel Service hevur tólv flogfør av sløgunum Boeing 737-800 og 737-500 og flutti 1,8 mió. ferðafólk í fjør.



*Mynd: Morgunblaðið*

# Madeleine hevði kolikk

Sum nýføðingur hevði Madelina kolikk, og tí noyddist mamman at bera hana upp í einar 18 tímar um døgnið. Tá tvíburðasystkini, Sean og Amelie, komu, gjørdist gentan sera krevjandi. Madelaine-málið, sum byrjaði í Praia da Luz í Portugál 3. mai, tá knapt 4 ára gamla smágentan hvarv sporleyst úr hotell kamarinum. Í eini samrøðu, sum portugisiskt magasin gjørdi við mammuna, Kate McCann, áðrenn hon formelt varð løgd undir illgruna, fortelur hon, hvussu hon bar gentuna grátandi upp í einar 18 tímar um døgnið, tí Madelina hevði kolikk. Í samrøðuni fortelir mamman eisini, tá Madelina sum 20 mánaðir gomul gjørdist stórasystir. Tá fór hon at krevja nógv av foreldrum sínum.

# iddina

høvi at fingið undirvísing ella komið saman í lestrarbólkum t.d. sunnudag seinnapart ella mánakvøld í hugtøkum sum náði ella trúarjáttan.

### Prest til heilsuverkið og vinnulívið

*Hvørjar verða høvuðsuppgávurnar hjá bispi?*

- Tað er týdningarmikið, nú vit hava yvirtikið kirkjuna, at vit ikki fara fíggjarliga út av eggini. Tað krevst neyv stýring, so kirkjuskatturin ikki eksploderar, sigur Jógvan Fríðriksson.

Presturin á Gjaranesi metir, at neyðugt verður at seta ein prest í Hoyvík sum skjótast og møguliga ein barna- og ungdómsprest Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi.

Jógvan Fríðriksson hevur nógvar hugsanir um, hvussu kirkjan kann skipa síni tilboð í framtíðini og ikki minst, hvussu kirkjan kann fíggja tey. Hann vísir á, at í allari speki í hesum árum verður víst á, at átrúnaður hevur nógv at siga fyri, hvussu fólk liva, og hvussu heilsustøðan hjá teimum er.

Hann heldur tí, at ein andalig dimensión átti at verið í heilsuarbeiðnum, og at Almanna- og heilsumálaráðið átti at endurrindað fyri tað arbeiðið, ið prestur ger á Ríkissjúkrahúsinum.

Í Danmark hevur seinastu árini verið gjørdar royndir við sokallaðum vinnulívsprestum, og hetta er eisini nakað, ið Jógvan Fríðriksson heldur, at Føroyar áttu at roynt.

- Arbeiðsmarknaðurin átti at havt sín prest t.d. tá hóttafall og uppsagnir vóru upp á tal, sigur Jógvan Fríðriksson, ið skemtiliga, men við einum broddi av álvara, leggur afturat, at fyritøkur í Danmark flúgva til Afrika fyri at sita við krossaðum beinum og hyggja upp í himmalinum.

Sjálvur metir Jógvan Fríðriksson, at vinnulívið skuldi verið til at goldið fyri ein slíkan prest, og hetta hevði verið »peanuts« hjá teimum, sum hann tekur til.

### Mentamálaráðið keypa serkunnleika frá prestum

Jógvan Fríðriksson leggur stóran dent, at kirkjan eigur at hava eina jaliga sjálvsfatan, ein positivan tóna, so fólk skulu kenna seg væl, tá tey hava verið í samband við hana.

- Vit mugu sjálv út at skapa trivnað skapa positivt afturljóð og vera positivt andlit í okkara fólki.

- Kirkjan skal ikki vera alt, men hon skal hava rúm fyri øllum menniskjum. Hon skal vera skjól í einum turbulentum og rokmiklum gerandisdegi.

- Tað er ikki bara bispur, sum skal vera sjónligur, men øll kirkjan, sigur Jógvan Fríðriksson, og nevnir eitt nú blaðið Kirkjutíðindi, har hann sjálvur hevur verið blaðstjóri seinastu árini.

Jógvan Fríðriksson nevnir eisini tað stóra fyrisitingarliga arbeiðið, sum skal gerast í sambandi við arbeiðið, og í hesum sambandi metir hann tað hava týdning, at kirkjan ikki kemur ov seint, men hevur eitt miðvíst samstarv við Mentamálaráðið.

- Um eg verði bispur, vildi eg mælt til, at Mentamálaráðið átti at keypt ekspertisu frá prestum, so ein ella tveir prestar vórðu keyptir leysir. Tað tekur ov langa tíð, um fólk skulu hava hetta arbeiðið við síðuna av, sigur Jógvan Fríðriksson.

### Varðveita ritual og liturgi

*Hvørjar verða tær størstu avbjóðingarnar hjá føroysku fólkakirkjuni næstu árini?*

- At varðveita breiddina. Eg vil alvorliga siga við allar prestar, eisini meg sjálvan, eisini rørslurnar, at næsta árið skulu vit finna hóvliga saman, leggja vápnini og virða hvønn annan.

- Vit skulu í felag sita saman og gera kirkjuna til eitt trivnaðarpláss.

- Vit eiga at finna fram og byggja upp í sátt. Vit halda ofta, at fimm milliónir skulu á borðið fyri at gera okkurt. Men trivnaður kemur av at analysera ein sjálvan. Kynstrið er at vera saman í ymiskleikanum, og at vera ósamdur saman.

- Kirkjan skal varðveita tey gomlu eyðkennini, sálmar og traditiónir. Nógv fólk t.d. rithøvundar og tónleikarar arbeiða saman við sálmabókanevndini. Sálamabókin er góð, men tað ger einki, um eitt nú okkurt anglikanst kemur uppí.

Kirkjan hevur ein bygnað, sum ikki skal kappast við alt annað og fáa ein mótiform, vit skulu við smávegis dagføringum - t.d. málsligum - varðveita liturgi og ritual, sigur Jógvan Fríðriksson.

Um ritualini fortelur sjóvarprestur um eina ferð hann sum ungur prestur á Viðareiði hevði eina brúðarvígslu í Christianskrikjuni. Sjálvur helt Jógvan Fríðriksson, at ritualið var ov drúgt, men tá segði deknurin við hann:

- Um nakað er ov langt, so er tað tín prædika, tí ritualið sigur alt.

- Vit skulu halda fast við tað, vit hava, tað dygdargóða arvagóðsið, sum er slitstyrkin í Fólkakirkjuni, sigur Jógvan Fríðriksson.

**Sosialurin prentar í hesi vikuni samrøður við øll valevnini til biskupsvalið. Í dag verður prátað við Jógvan Fríðriksson, prest**

# Kvinnan í Norðurlondum

**»Kvinnan í Norðurlondum« verður evnið á norðurlendsku bókasavnsvikuni 2007, sum verður hildin í Norðurlondum og Baltalondum samstundis í døgunum 12-18. november.**



*Anne B. Ragde, Astrid Saalbach og Auður Jónsdóttir*

BØKUR

*Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð*

Longu mánadagin 12. november fara fólk í túsundatali at savnast á bókasøvnum, skúlum og í ymiskum øðrum felagshølum - í fleiri enn 2.000 plássum - at hoyra søgur. Um morgunin fara skúlabørn at taka lut í tiltakinum »Dimmalætting«, har tey fara at hoyra brot úr tveimum søgum eftir Astrid Lindgren, Ronja ránsmannsdóttir og Pippi fer umborð. Út móti kvøldi, klokkan 19, byrjar tiltakið ”Skýmingarløtan”, og tá verður lisið upp brot úr skaldsøguni Kristin Lavransdatter eftir Sigrid Undset.

Øll vikan verður síðan á tremur við upplestri, fyrilestrum, orðaskifti og øðrum mentanarligum tiltøkum. Úr Føroyum hevur bara Bókadeild Føroya lærarafelags teknað seg higartil, men væntandi fara mong onnur bókasøvn, skúlar, forløg og feløg at tekna seg. Tað kunnu tey gera á heimasíðuni www.bibliotek.org/, har annað tilfar um bókasavnsvikuna eisini er at finna.

Hóast sjálv bókasavnsvikan ikki verður fyrr enn í november, fer tiltakið í roynd og veru av bakkastokki við einum námsskeiði longu á bóka- og bókasavnsstevnuni Bok & Bibliotek í Göteborg, sum byrjar 27. september. Tá fara tær tríggjar Anne B. Ragde úr Norra, Astrid Saalbach úr Danmark og Auður Jónsdóttir úr Íslandi, sum allar júst hava givið út skaldsøgur, við støði í áður nevndu skaldsøgu, Kristin Lavransdotter eftir Sigrid Undset, at skifta orð um sterkar, sjálvstøðugar kvinnur í norðurlendskum bókmentum, og um hvussu tað stendur til við javnstøðuni hjá norðurlendsku kvinnuni.

Tað eru Föreningarna Nordens Förbund, Bok & Bibliotek og PR-foreningen for nordiske biblioteker, sum í felag skipa fyri hesum námsskeiði. Sosialurin fer at hava fólk á staðnum, og ein samandráttur av orðaskiftinum verður at lesa á Portalinum seinni.

# Endaði í grøvini



*Hóast hitastigini hava verið lækkandi seinastu dagnarnar, og vegurin sær spegilsblankur út á myndini, var tað ikki hálka, sum gjørdi, at hesin bilurin fór út av í morgun omanfyri Syðrugøtu. Tí hevur helst verið talan um ósketni.*

*Mynd: Jonhard Hammer*